# Svimjiskúlin

Leygardagin 23. august er møguleiki at tekna seg til svimjiskúlan millum kl. 13.00 - 17.00 á tel 31 98 85 ella 31 37 27.

Í sama tíðarskeiðið kann tilmelding eisini fara fram við at venda sær til felagshøli hjá Havnar Svimjifelag í Svimjihøllini í Gundadali.

Aldursmark er skúlabyrjan.

*Tilmeldingin verður avmarkað!*
*Gjaldast skal innan viku 36 tá svimjingin byrjar, á konto nr. 9870-101.594.0 í Suðuroyar Sparikassa.*
*Navn barnsins skal viðmerkjast. Er ikki goldið innan 15. sept. 2003, verður tilmeldingin ógildað og plássið latið øðrum.*

*Hesi eru liðini:*

**Skvatl og spæl: 500,- kr. fyri svimjiárið**

| | | | |
|---|---|---|---|
| SS1 | Mikudag | kl. 15.15 - 16.00 | Gundadalur |
| SS2 | Mikudag | kl. 16.00 - 16.45 | Gundadalur |
| SS3 | Týsdag | kl. 15.15 - 16.00 | Argja skúli |
| SS4 | Týsdag | kl. 16.00 - 16.45 | Argja skúli |

**Eitt sindur royndur: 500,- kr. fyri svimjiárið**

| | | | |
|---|---|---|---|
| ESR1 | Mikudag | kl. 15.15 - 16.00 | Gundadalur |
| ESR2 | Mikudag | kl. 15.15 - 16.00 | Gundadalur |
| ESR3 | Mikudag | kl. 15.15 - 16.00 | Gundadalur |
| ESR4 | Mikudag | kl. 16.00 - 16.45 | Gundadalur |
| ESR5 | Mikudag | kl. 16.00 - 16.45 | Gundadalur |
| ESR6 | Mikudag | kl. 16.00 - 16.45 | Gundadalur |
| ESR7 | Týsdag | kl. 16.45 - 17.30 | Argja skúli |
| ESR8 | Týsdag | kl. 17.30 - 18.15 | Argja skúli |

**Roynd: 600,- fyri svimjiárið**

| | | | |
|---|---|---|---|
| R1 | Týsdag | kl. 15.45 - 16.30 | Gundadalur |
| R1 | Leygardag | kl. 17.30 - 18.30 | Gundadalur |
| R2 | Týsdag | kl. 16.30 - 17.15 | Gundadalur |
| R2 | Leygardag | kl. 17.30 - 18.30 | Gundadalur |
| R3 | Týsdag | kl. 17.15 - 18.00 | Gundadalur |
| R3 | Leygardag | kl. 17.30 - 18.30 | Gundadalur |

**Talent-lið/ Smá-unglingar: 800,- kr. fyri svimjiárið**

| | | | |
|---|---|---|---|
| T1 | Týsdag | kl. 18.00 - 19.00 | Gundadalur |
| T1 | Hósdag | kl. 16.00 - 17.00 | Gundadalur |
| T1 | Leygardag | kl. 17.30 - 18.30 | Gundadalur |
| T2 | Týsdag | kl. 19.00 - 20.00 | Gundadalur |
| T2 | Hósdag | kl. 17.00 - 18.00 | Gundadalur |
| T2 | Leygardag | kl. 17.30 - 18.30 | Gundadalur |

*Viðvíkjandi eldru svimjiliðunum fæst nærri at vita við at venda sær til felagið.*

*Vegna ov lítla undirtøku hevur Havnar Svimjifelag onga svimjing í Kollafirði svimjiárið 2003/2004*

*Endaligu liðini og venjingartíðir teirra, verða kunngjørd á einum lista, sum verður hongdur upp uttanfyri felagshølið í svimjihøllini í Gundadali hósdagin 28. aug. 2003.*

HAVNAR SVIMJIFELAG
Tel 31 98 85
Fax 31 37 27

SUÐUROYAR SPARIKASSI
er høvuðstuðul hjá felagnum!



## Lærlingur til søludeildina

Vit sóknast eftir einum lærlingi til søludeild okkara í Tórshavn at byrja sambært nærri avtalu.

Vit vilja bjóða tær eina útbúgving á einum spennandi og skjóttvaksandi virkisøki innan handil við byggitilfari.
Útbúgvingin fevnir um grundleggjandi vitan innan sølu- og innkeyp av byggitilfari.
Tú skal saman við starvsfelagum tínum verða við í støðugu menningini av handli okkara, har vit seta tænastu og góðsku í hásæti.

**Vit krevja at tú:**
- í minsta lagi hevur lokið FHS-prógv
- ert nærlagdur og røkin
- vísir vilja at samstarva við onnur

Hevur tú áhuga í handli innan byggivinnuna, og hevur tú omanfyri nevndu eginleikar, kanst tú senda okkum eina umsókn saman við prógvum og ummælum..

**Umsóknin skal sendast til:**
Timburhandilin
Att: Jógvan Jørgensen
Box 3038
FO-110 Tórshavn

*Hevur tú spurningar kanst tú seta teg í samband við Jógvan Jørgensen á tlf. 31 12 50*

## Sølufólk til Byggimarknaðin

Vit sóknast eftir sølufólkum til byggimarknað okkara í Tórshavn at byrja sum skjótast ella sambært nærri avtalu.

Vit vilja bjóða tær eitt starv í einum spennandi og skjóttvaksandi virkisøki innan bygging.
Tú kemur sum høvuðsøki at starvast við sølu í byggimarknaðinum, har tú eisini verður ein natúrligur partur innkeypi sum heild.
Tú skalt saman við starvsfeløgum tínum verða við í støðugu menningini av handli okkara, har vit seta tænastu og góðsku í hásæti.

**Vit vænta at tú:**
- hevur kunnleika til EDV á brúkarastøði
- ert fyrikomandi
- ert nærlagdur og røkin
- vísir vilja at samstarva við onnur

Hevur tú áhuga í handli innan byggivinnuna, og hevur tú nevndu eginleikar, kanst tú senda okkum eina umsókn.

**Umsóknin skal sendast til:**
Timburhandilin
Att: Jógvan Jørgensen
Box 3038
FO-110 Tórshavn

*Hevur tú spurningar kanst tú seta teg í samband við Jógvan Jørgensen á tlf. 31 12 50*

## Bilførari til Timburhandilin á Kambsdali

Vit sóknast eftir einum bilførara við vanligum koyrikorti at byrja sum skjótast.

Vit vilja bjóða tær eitt starv í einum spennandi og skjóttvaksandi virkisøki innan handil við byggitilfari.

Starvið sum bilførari fevnir um útkoyring av byggitilfari, umframt avgreiðsluarbeiði.

Trukkloyvi gevur fyrimun, men er ikki ein treyt.

**Vit vænta at tú:**
- ert nærlagdur og røkin
- vísir vilja at samstarva við onnur

Hevur tú áhuga í handli innan byggivinnuna, og hevur tú nevndu eginleikar, kanst tú senda okkum eina umsókn.

**Umsóknin skal sendast til:**
Timburhandilin
Att: Jógvan Jørgensen
Box 3038
FO-110 Tórshavn

*Hevur tú spurningar kanst tú seta teg í samband við Jógvan Jørgensen á tlf. 31 12 50*

TIMBUR HT TILFAR HANDILIN

**Tórshavn:** Tel 31 12 50 • Fax 31 54 60 • ht@ht-tilfar.fo
**Sandur:** Tel 36 12 50 • Fax 36 11 50 • ht@ht-tilfar.fo • **Kambsdalur:** Tel 44 44 41 • Fax 44 48 41 • ht@ht-tilfar.fo
**www.timburhandilin.fo**

petur & petur • 320870




**UTTAN ÚR HEIMI**

# Avstralska stjórnin snaraði Irak-frágreiðingum

**Stjórnin í Avstralia segði ósatt um hóttanina frá irakskum hópoyðingarvápnum fyri at rættvísgera, at landið skuldi taka lut í krígnum við Irak, sigur ein fyrrverandi yvirmaður í avstralsku fregnartænastuni**

IRAK-FRÁGREIÐINGAR
*Árni Joensen*

Andrew Wilkie arbeiddi sum yvirmaður í avstralsku fregnartænastuni til fyri stuttum, men gjørdi av at fara úr starvinum fyri at mótmæla, at land hansara fór í kríggj við Irak saman við amerikanarum og bretum.

Í gjár kom hann fyri eina serliga kanningarnevnd, sum kannar, um stjórnin hjá John Howard, forsætisráðharra kom við skeivum ella misvísandi upplýsingum undan krígnum í Irak.

– Stjórnin leyg, tí hon snaraði teimum upplýsingum, sum hon fekk um Irak og vandan fyri tess hópoyðingarvápnum, og í øðrum førum nýtti hon sjálvgjørdar upplýsingar, segði Andrew Wilkie undir avhoyringini.

Hann legði afturat, at stjórnin strikaði orð úr frágreiðingunum hjá fregnartænastuni og sett onnur orð ístaðin – orð, sum kundu rættvísgera, at Avstralia kundi fara í kríggj saman við USA og Bretlandi.

# David Kelly boðaði frá sínum egna deyða



*David Broucher á veg til hús aftan á rættarfundin, har hann greiddi frá, at David Kelly longu í februar segði sær, at hann fór at verða funnin deyður, bleiv Irak álopið*

**Longu í februar segði bretski vápnaserfrøðingurin David Kelly einum vinmanni, at bleiv Irak álopið, fór hann helst at verða funnin deyður í skóginum**

KELLY-MÁLIÐ
*Árni Joensen*

Áhoyrararnir í rættarhølinum í London hildu andanum, tá embætismaðurin David Broucher varð avhoyrdur hósdagin sum vitni í málinum um vápnaserfrøðingin og stjórnarráðgevan David Kelly, sum tók lívið av sær herfyri.

Broucher, sum arbeiðir í bretska uttanríkisráðnum, greiddi frá, at hann hevði hitt David Kelly á einari ráðstevnu í Sveits síðst í februar. Kelly greiddi honum frá, at hann hevði vissað iraksku leiðararnar um, at teir høvdu einki at stúra fyri, bara teir samstarvaðu við vápnaeftirlitsmenninar hjá ST. Trupulleikin var, at lupu amerikanarar og bretar á Irak kortini, fóru iraksku leiðararnir at meta Kelly sum ein lygnara, sum hevði svikið teir. Broucher segði seg hava fingið ta uppfatan, at hesin møguleikin tyngdi David Kelly.

– Eg spurdi hann, hvat so fór at henda. Hann svaraði, at so fór hann helst at verða funnin deyður í skóginum. Eg gav mær ikki stórvegis far um hetta tá, men eg skilji nú, at hann hugsaði øðrvísi, enn eg helt hann gera, segði David Broucher í rættinum í London.

Kelly-málið hevur vakt stóran ans í Bretlandi, og øll bíða nú í spenningi eftir avhoyringunum í næstu viku, tí tá skulu bæði Tony Blair, forsætisráðharri og Geoff Hoon, verjumálaráðharri avhoyrast.

## KrF ein frammaná

Flokkurin hjá norska forsætisráðharranum Kjell Magne Bondevik, sær út til at fara at fáa ein dyggan frammaná á kommunuvalinum í heyst.

Tær báðar seinastu veljarakanningarnar vísa, at var kommunuvalið nú, hevði Kristiligi Fólkaflokkurin hjá forsætisráðharranum fingið millum 5,5 og 5,7 prosent av atkvøðunum. Tað er stór afturgongd, tí á seinasta valinum fekk flokkurin 9,3 prosent. Kanningarnar vísa eisini, at tað er serliga í seinastuni, at flokkurin hevur mist nógvar veljarar. Tað kemst ivaleyst av, at seinastu tíðina eru tvey valevni hjá flokkinum sett í samband við kynsliga misnýtslu.

Eftir báðum kanningunum er Arbeiðaraflokkurin tann størsti í Noregi nú. Í aðrari kanningini fær hann 23,5 prosent og í hinari 26,3. Framburðsflokkurin er tann næststørsti við 19,8 prosentum, og á triðja plássi er Sosialistiski Vinstriflokkurin, sum fær 18,1 prosent.

## Ætla at útseta val

Í Danmark skal kommunuval haldast í november í 2005, men nógv bendir nú á, at býráðslimirnir sleppa at sita nakað longri enn tað. Tað sama er galdandi fyri teir, sum stýra amtunum.

Innanríkisráðið í Keypmannahavn, sum umsitur kommunurnar, umhugsar at útseta tað næsta kommunuvalið. Lars Løkke Rasmussen, innanríkisráðharri, sigur við danska útvarpið, at stjórnin ætlar at leggja fram uppskot um umfatandi bygnaðarbroytingar í kommununum, men at tað verða neyvan stundir til at avgreiða málið eftir hálvum øðrum ári. Ætlanin við nýggju skipanini er millum annað at broyta verandi uppgávubýti millum statin, amtini og kommunurnar.

Verður kommunuvalið útsett, er tað kortini ikki fyrstu ferð, at tað hendir í Danmark. Undir krígnum varð kommunuvalið, sum skuldi vera í 1941, útsett til 1943.

## Fimm børn funnin deyð

Løgreglan í polsku bygdini Czerniejow fann hósdagin líkini av fimm nýføðingum í einum húsum í bygdini.

Í gjár skuldu læknarnir kanna, hvussu børnini doyðu, og um talan var um fimmburðar, men tær fyrstu kanningarnar bendu á, at børnini vóru á lívi, tá tey vórðu fødd. Talan er um fýra dreingir og eina gentu.

Polska løgreglan leitaði í gjár eftir einari kvinnu, sum búði í húsunum, men sum var horvin haðani. Sambært polsku fjølmiðlunum hevur maður hennara sýtt fyri at upplýsa, um kona hansara var við barn. Heldur ikki grannarnir vildu siga løgreglumonnunum, um tann horvna kvinnan var við barn.

## Skutu við skørpum undir upptøku

Arbeiðið at gera ein nýggjan meksikanskan film endaði sum ein sorgarleikur seinasta leygardag.

Tað vísti seg, at ein av leikarunum hevði fingið eina skammbyrsu, sum var lødd við veruligum kúlum. Í filminum skuldi hann skjóta seks skot við leysakrúti eftir einum av sínum viðleikarum, men tá hann lat skotini av, small viðleikarin illa særdur. Hann varð alt fyri eitt fluttur á sjúkrahús í býnum Cuernavaca, har læknarnir royndu at bjarga lívi hansara, men til fánýtis.

Løgreglan tók alt fyri eitt mannin, sum hevði skotið, men hann varð seinni latin leysur. Nú leitar løgreglan eftir manninum, sum stóð fyri sjálvari filmsgerðini, tí í seinna enda er tað hann, sum hevur ábyrgdina av, at øll útgerðin er, sum hon eigur at vera.